# Skatta- og avgjaldsmál avgerðir

| Mál nr.: 10-02-24-20 | Lóg: Skattalógin § 104 | Avgerð tikin: 01.07.2010 |
|---|---|---|

## Sýtt at eftirgeva sekt

**Samandráttur:**

**Kært er um, at TAKS hevur álagt kæraranum sekt eftir § 104 í skattalógini vegna ov seint innsenda sjálvuppgávu fyri 2008. Sambært upplýsingunum frá TAKS er hetta ikki fyrstu ferð, at kærarin ikki letur sjálvuppgávuna inn til tíðina, og hetta hevur í sjálvum sær við sær, at sektin ikki kann eftirgevast. Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur tí avgjørt at staðfesta avgerðina hjá TAKS at nokta eftirgeving av sektini sambært § 104, stk. 3 í skattalógini.**

### Avgerð

**Kært er um**, at TAKS hevur álagt kæraranum sekt eftir § 104 í skattalógini.

**TAKS** hevur víst til § 104, stk. 3 í skattalógini. Í hesum føri snýr tað seg um sekt vegna ov seint innsenda sjálvuppgávu fyri 2008. Grundgevingin hjá kæraranum er ikki fullgóð fyri at frítaka hann fyri hækkingini, heilt ella deilvíst. Kærarin hevur fingið sjálvuppgávu sendandi í februar 2009. Sambært skattalógini skulu øll lata sjálvuppgávu inn, ið ikki innan 15. mars hava móttikið skattauppgerð.

TAKS upplýsir m.a. í telduposti frá 17. juni 2010, at kærarin eisini hevur latið sjálvuppgávuna fyri 2006 ov seint inn, tó uttan at bót varð áløgd.

**Kærarin** upplýsir m.a., at hann hevur søkt TAKS um at sleppa undan sektini á kr. 8.334.

Kærarin forvann kr. 10.000 í 2006 uttan um skattin og sendi av sínum eintingum kr. 3.000 av hesi upphædd inn til TAKS at gjalda fyri skattin av hesi upphædd.

Fyri 1-2 mánaðum síðani fær kærarin at vita, at hann framvegis stendur at forvinna hesa upphædd uppá kr. 10.000, hóast hann einki hevur forvunnið uttan um A-inntøkuna síðani 2006. Kærarin skal tí gjalda kr. 6.120 kr. og fær síðani at vita, at hendan upphædd er vaksin til kr. 8.333 kr. við rentum.

Kærarin hevur upplýst TAKS í telefonini, at eingin B-inntøka hevur verið í 2007 og 2008. Málsviðgeri hjá TAKS hevur upplýst, at kærarin hevur fingið sjálvuppgávu í februar, sum kærarin ikki hevur latið inn aftur. Hetta hevur kærarin als ikki gáa um. Hjúnafelagin hjá kæraranum var júst deyður, og byrjanin av 2009 var sera tung og trupul tíð, sum var eyðkend av nógvum leysum endum, ikki minst tá tað galt tað fíggjarliga. Hjúnafelagin hevði seinastu 20 árini tikið sær av skattaviðurskiftunum, so kærarin hevur lítla vitan á hesum øki.

Ein onnur orsøk til, at kærarin ikki hevði gáað um hetta bræv frá TAKS var, at kærarin visti, at allur skatturin var goldin og væntaði tí einki bræv frá TAKS. Kærarin hevur bert havt A-inntøku í fleiri ár.

Kærarin vísir til § 104 í skattalógini og viðmerkir, at kærarin hevur verið í eini serliga truplari støðu vegna trupla sjúkralegu hjá hjúnafelaganum við mánaðum uttanlanda í sjúkraørindum,

har stakkar av posti hava ligið á láni, tá tey eru komin heim, og at enda tað at standa einsamallur eftir deyða hjúnafelagans.

Kærarin førir eisini fram, at hann ikki eigur at gjalda sektina, tí hann helt seg hava greitt hesi viðurskifti pr. telefon við málsviðgera á TAKS.

Kærarin upplýsir í telefonsamrøðu tann 28. juni 2010, at hann ikki veit, hvat er hent í 2006, tí hjúnafelagin tók sær av skattaviðurskiftum teirra.

**Avgerðin hjá Skatta- og avgjaldskærunevndini**
Sambært § 104, stk. 2 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. September 1983 um landsskatt og kommunuskatt (skattalógin) verður sekt áløgd við í mesta lagi kr. 5.000, um fullfíggjað sjálvuppgáva av inntøku ikki verður latin Toll- og Skattstovu Føroya rættstundis, ella sjálvuppgávan ikki kemur inn. Verður latið inn minni enn 7 dagar ov seint, verður samanlagdi inntøkuskatturin hækkaður við 2%. Verður latið inn 7 dagar ella meira ov seint, verður samanlagdi inntøkuskatturin hækkaður við 5%.

Tað framgongur av hesi grein, at sekt skal áleggjast einum skattgjaldara, um sjálvuppgávan ikki verður latin TAKS, ella um sjálvuppgávan ikki verður latin inn rættstundis. Skattgjaldarin fær í hesum sambandi onga ávaring við møguleika at lata sjálvuppgávuna inn innan eina nýggja freist fyri at sleppa undan sektini.

Sambært § 104, stk. 3 í skattalógini hevur TAKS tó heimild at eftirgeva sekt, sum verður áløgd, um sjálvuppgáva o.a. verður latið ov seint inn, tá tað av serligum orsøkum verður hildið at vera rímiligt.

Viðmerkingarnar til hesa grein siga, at undantak kann verða gjørt, um "tað bert kemur fyri eina ferð, og umstøðurnar annars tala fyri at eftirgeva sektina; serligar umstøður eru eitt nú sjúka, deyði og vanlukkur, sum hava við sær, at skattgjaldarin ikki fær latið sjálvuppgávuna inn rættstundis. Tað, at grannskoðarar, bókhaldarar eru ov seinir í sínum arbeiði, er eitt nú ikki ein umbering fyri frítøku av sektini."

Sambært upplýsingunum frá TAKS er hetta ikki fyrstu ferð, at kærarin ikki letur sjálvuppgávuna inn til tíðina, og hetta hevur í sjálvum sær við sær, at sektin ikki kann eftirgevast.

**Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur tí avgjørt at staðfesta avgerðina hjá TAKS at nokta eftirgeving av sektini sambært § 104, stk. 3 í skattalógini.**